# Havnin aftur í hásætinum

*Hóast B36 og HB higartil hava spælt við nógvum nýggjm fólki, so hava teir fingið fulla úrtøku. Hesa ferð megnaðu bæði havnarliðini á pappírinum torførar uppgávur*



*Meðan B36 vann á Toftum, tók HB sær av KÍ, so nú eru tey bæði høvuðsstaðarfeløgini ovast í bestu mansdeildini*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

Annað umfarið í landskappingini varð spælt í fínastu fótbóltslíkindum sunnudagin. Fjúrtan mál vórðu skorað í teimum fimm dystunum. Sandoyingar, sum av mongum hava verið mettir at vera upplagt evni til niðurflyting, vunnu einasta útisigurin.

Fyrsti javnleikurin á árinum var í Sørvági. Har hava teir stríðst við at fáa skil á vøllinum, og sunnudagin var vøllurin góður, tá rættuligur landskappingardystur fyri fyrstu ferð nakrantíð varð spældur har vesturi.

Tveir spælarar sóu reyða kortið. Annar var Bergleif Sólsker úr B71, og hin var Hans á Lag úr HB. Merkisvert var tað, at tað hjá báðum liðunum, sum spældu undirmannað, eydnaðist tað at vinna 1–0.

### Havnin fremst

Tvey lið hava framvegis einki stig mist. Tey eru B36 og HB. Meistaraliðini frá ávikavíst 1997 og 1998 hava mist fleiri spælarar undan hesum kappingarárinum, men higartil hevur hetta ikki bilað. Á Svangaskarði hevði B36, sum vann rudduligan 3–1 sigur á B68, sammett við teir ellivu, sum vóru mest á liðnum í fjør, sjey nýggjar menn á liðnum.

HB vann 1–0 á KÍ í Gundadali. Sammett við teir ellivu, sum vóru mest á liðnum í fjør, vóru bara fýra eftir millum teir fyrstu ellivu sunnudagin.

Bæði frá B36 og HB eru spælarar farnir í onnur feløg – ikki minst í B68 – men tilfarið í høvuðsstaðnum tykist vera eins gott, og tað var, áðrenn havnarfeløgini funnu uppá at fara út á bygd eftir manning til bestu liðini.

Í høvuðsstaðnum eru tey so smátt farin at kynda uppundir lokaluppgerðina millum B36 og HB. Hin fyrra verður í áttanda umfarinum, sum er á skránni 4. juni. Inntil tá kann nógv venda niður, sum nú vendir upp, men at bæði B36 og HB fara at stríðast um fremstu plássini, er tað neyvan nakað at ivast í.

### Klaksvíkin púra sør

Fyri hálvari aðru viku síðani gav Sosialurin út eitt serligt fótbóltsblað. Í blaðnum varð spurt, hvussu fleiri, sum fylgja væl við í fótbóltinum, roknaðu við, at gongdin fór at vera í 1. deild. Felags fyri tey flestu var, at tey roknaðu KÍ at vera mest upplagda evnið til meistaraskapin.

Nú tvær vikur seinni sær støðan hjá KÍ einki serlig út. Meistararnir og steypavinnararnir frá í fjør hava einki stig fingið. Teir hava tapt tvær ferðir 1–0, og tað vil siga, at teir higartil ikki hava skorað.

Enn eru nógv stig at spæla um, og enn fer tað ivaleyst at bera til hjá klaksvíkingum at blanda seg millum tey fremstu. Einki er at ivast í, at Tomislav Sivic og klaksvíkingar rannsaka seg sjálvar. Teir hava arbeitt nógv og miðvíst, og nú hava teir ryggin móti múrinum.

Óhepna gongdin byrjaði, tá teir taptu móti NSÍ bæði leygardag og mánadag. Nú klaksvíkingar skulu royna at berja seg uppundan aftur úrslitaliga skulu teir á heimavølli spæla tvær ferðir móti VB – fríggjakvøldið í steypakappingini og sunnudagin í landskappingini!

Vágbingar vera svangir, tá teir koma til Klaksvíkar. Ósigurin móti sandoyingum nívir sjálvandi sera dygt.

### Hini

Higartil eru bara tvey umførspæld, og tað kann vera so skjótt, at tað vendir. Saman við havnarliðunum eru teir í NSÍ teir einastu, sum higartil ikki hava tapt. Tá teir stutt undan leikloki skoraðu til 3–2 í Sørvági, mundu teir kenna tað vera sigursmálið, og so vóru teir ikki nóg ansnir. Komandi sunnudag verður toppdystur í Runavík, tí tá fær NSÍ vitjan av HB.

FS Vágar kom á stigatalvuna hesa ferð. Tá teir í 1997 vóru í 1. deild, vunnu teir í 13. umfarinum einasta sigurin. Hann var á heimavølli 24. august. Úrslitið móti ÍF var 4–2. Um tað fer at eydnast komandi sunnudag at vinna fyrsta sigurin í ár er rættuliga ivasamt, tí tá verður mótstøðuliðið í Gundadali B36.

GÍ hevur ikki nógv fólk. Sunnudagin fingu teir stigini móti Sumba, og tað var týdningarmikið. At B71 fekk øll stigini í Vági fer ikki at gera uppgávuna hjá GÍ í triðja umfarinum torførari. Sunnudagin skal GÍ til Sands. Higartil hevur B71 verið uppií tveimum stuldrum. Teir vóru harmir um í yvirtíðini í fyrsta umfarinum at missa stig móti HB. Hesa ferð kendu teir seg hava fingið ríkiligt í Vági.

Sumbingar stóðu seg betri í Gøtu hesa ferð, enn teir hava gjørt undanfarin ár. Í fjør taptu teir 7–2, og í fyrraárið vann GÍ 11–1.

Komandi sunnudag koma toftamenn suður á Krossin. Um B68 skal hugsa um at røkka málinum, sum er at blanda seg millum tey fremstu, so skulu teir hava trý stig í Sumba. Avrikið móti B36 vísti, at sjálvt um toftamenn hava fingið fleiri spælarar afturat, so eru teir ikki serliga væl fyri við fólki. Hesa ferð var Jan Petersen skaddur, og holið eftir hann tóktist tað vera torført at tippa.

JH

# Cimburovic spælir við TB

*2. deild: Tað er ikki bert Óli Johannesen, sum er komin til Tvøroyrar at styrkja um liðið*

GÍ–TB 2–3 (0–3)

Nógv verður í neyðini nýtt, og neyðin lærir nakna kvinnu at spinna. Hetta eru væl kend orðatøk, sum sannleikin í enn eina ferð er prógvaður hesa síðstu vikuna.

Fótbólturin á Tvøroyri kendi seg so sperdan, at teir góvu avboð til tveir teir síðstu dystirnar í bólkaspælinum í kappingini um løgmanssteypið. Frítíðin frá kappingardystum varð ikki bara brúkt til at fáa skaddu spælararnar at koma fyri seg í og til at venja í. Tíðin varð eisini brúkt til at skava so mikið av pengum saman, at tað bar til at fáa tveir spælarar aðrastaðni frá at hjálpa TB.

Sum vit søgdu í síðstu viku, so kom Óli Johannesen í síðstu viku heim úr AGF til at hjálpa barndómsfelagnum. Óli var á miðvøllinum í Gøtu leygardagin. Tað var týðuligt, at hann var ikki heilt komin seg eftir skaðan, sum hevur hildið honum burtur frá venjing, men bara tað at Óli var við, tóktist vera íblástur fyri hinar.

Milan Cimburovic var í fjør fyrst spælandi venjari hjá NSÍ. Eftir at samstarvið teirra millum var hildið uppat, spældi Milan við hvalbingum, og eftir summarsteðgin var hann eisini venjari hjá Sumba.

Í ár er Milan Cimburovic framvegis venjari hjá Sumba, men hann spælir við TB. Leygardagin var hann í miðverjuni hjá tvøránmonnum.

– Hann venur við okkum mánakvøld, so venur hann sumbingar hini kvøldini, áðrenn hann spælir við okkum leygardag, sigur Lynge Nielsen, sum er venjari hjá TB.

Tá góður hálvur tími var farin tóktist tað sum at TB skuldi vinna stórsigur í Sarpigerði. Teir fingu hol á í 11. minutti. Dan Mortensen, sum var í álopinum saman við Halli Christiansen og Bárðuri Dimon var í álopinum hjá TB, legði innfyri úr høgru, og ein av verjuspælarunum, sum var kroystur av Halli Christiansen, sendi bóltin í málið.

Á hálva tímanum økti Hallur Christiansen, tá hann stútaði hornasparksinnlegg úr vinstru frá Bárði Dimon í kassan. Miðvallarin í høgru, Teitur Rasmussen, økti lítla løtu seinni til 3–0.. Eftir honrasparksinnlegg úr høgru frá Andrá Dalfoss, kom bólturin út frá til kantspælaran, sum úr 20 metrum smekkaði til.

GÍ setti trýst á gestirnar í 2. hálvleiki, og tað var um reppið, at tað eydnaðist teimum at koma afturíaftur. Á tímaslagnum minkaði Símun Petur Justinussen um munin, tá hann sendi brotsspark framvið Hermani Mortensen, sum hesa ferð vardi TB málið (Magni Hentze er framvegis skaddur). Fýra minuttir seinni var Magni Jacobsen upp á spæl. Hann hevði verið kærkomin at havt á besta liðnum hjá GÍ, men miðvallarin ynskir ikki at leggja so nógv í venjingina, sum tað krevst í 1. deild.

TB var skelkað, tá GÍ sendi langar bóltar fram í brotsteigin, og tað var fleiri ferðir um reppið, at GÍ fekk mál. Eina ferð høvdu teir bóltin á tvørtrænum, men í síðsta enda vóru tað Óli Johannesen, Milan Cimburovic og hinir av Tvøroyri, sum fegnaðust. Teir fingu øll stigini, men teir ásannaðu eisini, at avrikið kann gerast betur, enn tað var hesa ferð.

JH



*B36 koppaði B68 á Toftum, tó at tað ikki alla tíðina var so bókstaviligt, sum á myndini omanfyri*

**Mynd: J. Jacobsen**



# KÍ saknar framvegis Kurt

*1. deild: Føroyameistararnir úr Klaksvík taptu eisini næsta landskappingardystin á árinum, tá teir í Gundadali máttu lúta 1-0 fyri HB, hóast teir sjálvir høvdu fleiri møguleikar at skjóta mál*




*Hans á Lag sá reytt, tá fáir minuttir vóru eftir at leika, men kortini megnaðu liðfelagarnir at halda fast um tepru leiðsluna*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

JÁKUP MØRK

HB-KÍ 1-0 (1-0)

Fyrri partur av stóra klassikaranum í føroyska fótbóltsheiminum skuldi leikast í Gundadali sunnudagin, tá tey bæði mest vinnandi feløgini í landinum, HB og KÍ skuldu royna at

Umframt at tað sjálvsagt altíð stendur nógv á, tá liðini hittast, so var kanska eyka nógv trýst á KÍ leikarunum undan hesum dystinum. Púra óvæntaða tapið móti NSÍ fyri viku síðani, skuldi vaskast burtur aftur, og harumframt vildi ein ósigur eisini viðført, at føroyameistararnir høvdu mist seks stig, nærum áðrenn landskappingin var komin í gongd.

### Tomislav við

Tað var eisini greitt, at klaksvíkingar løgdu nógv fyri í royndunum at vinna dystin. Ósemja hevur verið millum fyrrverandi felag hansara, B36, og venjaranum sjálvan, og hetta hevur havt við sær, at spæliloyvi hansara alla tíðina hevur verið í høvuðsstaðnum.

KÍ hevði tó gingið fíggjarligu treytunum hjá havnarmonnum á møti, soleiðis at Tomislav Sivic taldist millum teir 22 menninar, sum beint undan klokkan trý gingið skrúðgongu inn á ovara vøll.

Leikandi KÍ venjarin hevði hesuferð ikki valt eitt heilt so álopshugað útgangsstøði, sum hann ofta hevur gjørt áður. Flata verjan var umskipað, soleiðis at Jan Andreasen aftur var á vanliga leiklutinum sum sweepari, og hóast tað á pappírinum kanska skuldi vera ein 3-4-3 uppstilling, so tóktist Rógvi Jacobsen ógvuliga einsamallur á toppinum, tí Heðin og Tomislav, sum skuldu stuðla álopsmanninum, tóktust meira at vera miðvallarheldur enn álopsleikarar.

Álopskent spæl var heldur ikki talan um fyrstu løtuna av dystinum. Ta einu ferðina var Heðin tó nær við, eftir at Tomislav og Rógvi høvdu leikt seg ígjøgnum í høgru, men Bárður Johannesen í HB málinum fekk vart fyri.

Sum hálvleikurin leið, megnaði KÍ tó at flyta spælið alt meira oman á HB hálvuna. Við Marek sum miðvallarovasta, megnaðu teir fleiri ferðir at spæla HB miðvøllin tunnan, soleiðis at John og serliga Harley kundu leggja innfyri úr síðunum. Tað var tó so at siga ongantíð, at nakrir serligir málmøguleikar spurdust burtur úr hesum, tí HB málverjin ella verjuleikarar hansara fingu fatur á allarflestu bóltunum.

Hin vegin hendi ikki tað stóra. Størstur vandi tóktist vera á ferð, tá lítli kviki Bárður Mortansson royndi at bróta ígjøgnum, men hann fekk tó sera lítlan stuðul frá viðleikarum sínum.

Størsta møguleikan fekk Bárður tó sjálvur, tá 28 minuttir vóru leiktir. Rúni Nolsøe breyt ígjøgnum høgru megin, og sendi ein bólt innfyri. Bárður kom rennandi við fullari ferð, men púra leysur framman fyri málinum, megnaði hann ikki at fáa skot á bóltin.

Móti endanum av fyrra hálvleiki hendi so tað, sum allir klaksvíkingarnir vóru bangnir um. Bárður hevði bóltinum í vinstru síðu og sendi eitt bólt innyvir málið. Bólturin kom sera nær málinum, og ikki var líkt til, at nakar serligur vandi var á ferð. Gunnar í KÍ málinum kendi seg tó somikið órógvaðan av Jón Róa, at hann ongantíð fekk fatur á bóltinum, soleiðis at Gigi ístaðin kundi setta høvdið á bóltin, sum fór í tóma málið.

KÍ leikararnir vóru í øðini, tí teir mettu Jón Róa hava gjørt fríspark móti málverjanum, men at síggja til hevði Gunnar eins nógva skuld sjálvur. Báðir lupu teir nevnliga alt ov tíðliga upp, og tá Jón Rói var farin áðrenn, kom hann nærum at liggja á rygginunum hjá Gunnari, tá hesin fór upp. Hevði Gunnar ístaðin bakka tvey fet, er einki at ivast í, at hann stillisliga kundi loftað bóltinum, men so var ikki, og HB var nú á odda 1-0.

### Megnaðu ikki at skora

Í seinna hálvleiki helt KÍ liðið fram at trýsta. Beint sum hálvleikurin byrjaði, hevði Heðin stóran møguleika, men hann fekk ikki skot á bóltin. Klaksvíkingar royndu sostatt framhaldandi at trýsta, men í hinum endanum vóru havnarmenninir nú eisini nógv hvassari, enn teir høvdu verið fyrra umfarið. Tvær ferðir var um reppið, at teir øktu um leiðsluna, men fyrru ferð prikaði Símun bóltin á stongina, meðan sami leikari seinni skeyt beint í krovið á málverjanum.

Møguleikararnir hjá HB førdu eisini við sær, at KÍ alla tíðina mátti ansa eftir í verjupartinum, hóast teir eisini máttu satsa. Møguleikar høvdu teir tó fleiri av, og tað einu ferðina var eisini líkt til, at tað hevði eydnast teimum at javna. Tað var tá Heðin sendi eitt kanónskot á undirsíðuna av tvørstongini, bólturin støkk í svørðin og út aftur í spæl, men uppfylgjandi skallarin fór við síðuna av málinum. Linjuverjin veitraði tó við flagginum, og tá dómarin helt hann veitra fyri, at bólturin hevði verið innanfyri, tá Heðin skeyt, dømdi hann mál.

Frøin var sjálvandi ovurhonds stór á KÍ leikarunum, men alt meðan teir fegnaðust um málið, gjørdi linjuverjin dómaran varugan við, at hann hevði veitrað fyri rangstøðu í næstu málroyndini.

Stutt eftir hetta varð HB liðið skorið niður í 10 mans, tá Hans var ov seinur, og ístaðin jarðlegði Rógva við einari fúlari eftirtakling. Longu áðrenn frísparkið fyri hetta varð tikið, átti HB liðið helst eisini at verið skert enn meira. Í trunkanum av fólki, sum bíðaðu eftir frísparkinum, langaði Florin til Rógva, so hesin enn einaferð lá skerflatur. Hvørki dómarar ella linjuverjar sóu tó hendingina, so HB leikararnir sluppu við hvøkkinum.

Tíðin var nú farin at halla, og trýstið frá KÍ gjørdist alt meira desperat, og hetta opnaði eisini fyri mótálopum, men hóast HB í einum tveimum førum hevði sera góðar umstøður, so megnaðu teir ongantíð at gera sær rættuliga dælt av hesum.

Framman fyri HB málið kundi Heðin havt gjørt sítt til fyri at fáa javnvág í roknskapin, men fyrru ferðina skeyt hann, ístaðin fyri at spæla upp á tvørs, og seinnu ferðina gjørdi hann heldur skjótt av, tá hann púra leysur skeyt á brotsteigarmarkinum.

Nærri enn tað sama komu klaksvíkingarnir ikki, og tí kundu HB leikararnir fegnast, tá dómarans floyta hevði ljóðað fyri seinastu ferð.

### Tannleyst álop

Størsta orsøkin, til at KÍ heldur ikki hesu ferð fekk stig við sær, er, at teir als ikki tykjast hava vunnið á missinum av Kurt Mørkøre.

Enn er kanska nakað tíðliga á árinum, soleiðis at rætta gliðið ikki er komið á sjálvt spælið, men kortini megnaðu teir fleiri ferð at bróta seg ígjøgnum í síðunum. Bóltarnir komu eisini væl innfyri, men í flestu førum var álopið alt ov tannleyst. Ikki tí, Rógvi er framúr sterkur við høvdinum, men hann hevur ikki styrkina hjá Kurt, og tí megnaði hann ongantíð at skapa vandamiklar støður burtur úr innleggunum.

Hinvegin var hann maðurin handan flestu KÍ møguleikarnar, tá hann fleiri ferðir fekk snittað bóltin víðari, soleiðis at Heðin kundi renna bóltin upp, men sum longu nevnt, so spurdist heldur einki burtur úr hesum.

Hjá HB er støðan eitt sindur øðrvísi. Málsetningur teirra er ikki heilt so høgur, sum hann er hjá klaksvíkingunum, og tí er ikki sama trýstið á leikarunum. Nýskipanin av liðnum tykist longu nu vera væl ávegis, men kortini hava leikararnir ikki funnið seg heilt til rættis á øllum plássum.

Serliga tykjast Jón Rói Jacobsen og Símun Eliasen at hava trupulleikar við spælinum. Eingin ivi er um, at fótbóltsevnini hjá Jón Róa eru góð, men enn eru nakrir manglar. Serliga er tað í renningini uttan bólt, at hann kann betra seg, og her kann hann uttan iva læra nógv av álopsfelaga sínum, Bárða Mortanssyni. Símun hevur higartil altíð leikt mitt á miðvøllinum, og nú hann er staddur vinstrumegin, tykist hann als ikki hava funnið seg til rættis. Styrki hansara hevur eisini altíð verið at hann megnar at blandað seg upp í so at siga alt á miðvøllinum, men hetta kemur als ikki til sín rætt nú. Sama trupulleiki hevði Sámal Erik eisini, tá hann í seinna hálvleiki hevði loyst Gigi av.

Samanumtikið er tó líkt til, at spælið hjá nýggja HB liðnum er á eini leið, og í øllum førum hevur felagið við hesum eitt gott grundarlag at byggja framtíðar fyrstudeildarlið felagsins á. Hvørt hetta verður nóg mikið til at vinna heiðursmerki longu í ár, er helst ov tíðliga at siga enn, men fyribils hevur úrtøkan verið 100%, og tað man ikki vera so heilt av leið.

**HB-KÍ 1-0 (1-0)**
1-0 Gigi 43.

Dómari: Jens Petur Brattalíð

**HB:**
Bárður Johannesen - Jóhannis Joensen, Florin Miháescu, Hans á Lag, Janus Joensen - Gigi, Ingi Rasmussen, Rúni Nolsøe, Símun Eliasen - Jón Rói Jacobsen, Bárður Mortansson

**KÍ:**
Gunnar á Steig - Ove Nysted, Jan Andreasen, Niclas Niclasen - Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Mark Wiersbicki, John Ryan - Tomislav Sivic, Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni



*Hvat skal til fyri at venda gongdini? Tomislav Sivic hevur nóg mikið at hugsa um í hesum døgum*

**Mynd: Álvur Haraldsen**